# So kom Lindin

*-Hetta hava vit bíða eftir í meira enn tíggju ár, so sjálvsagt eru vit sera fegin um, at støðin nú er vorðin veruleiki, sigur Preben Hansen, nevndarformaður á nýggju útbarpststøðini, Lindin*

JÁKUP MØRK

Beint eftir klokkan trý fríggjadagin, kundi Lindin senda fyrstu tónarnar út í luftina, og tá Jenis av Rana eftir fyrsta lagið kundi tosað umvegis mikrofonina til stóra lurtaraskaran, var hetta av sonnum ein stór løta fyri øll tey, sum vara at støðini.

Preben Hansen, nevndarformaður í Lindini, sigur við Sosialin, at teir longu í 1989 skrivaðu fyrsta brævið til Landsstýri, í royndini at fáa monopolið á loftmiðlaøkinum avtikið.

Níggju ár og 364 dagar seinni, kom nýggja loftmiðlalógin í gildi, og fyrst í november varð so byrjað at savna inn pening til nýggju støðina.

**Víðka sendiøkið**

Innsavnanin gekk væl, og ikki gekk long tíð, áðrenn tað gjørdist greitt, at støðin veruliga fór at gerast veruleiki.

Nógvir smálutir af ymsum slag skuldu tó fáast upp á pláss, áðrenn støðin kundi fara undir fyrstu sendingarnar. Sendiútgerð skuldi keypast, høli gerast klár o.s.fr.

Hetta arbeiði hevur alt gingið í fínasta lag, og sostatt kundu fyrstu ljóðini verða varpað út fríggjadagin.

At byrjað við verður tað so at siga bert meginøki, sum fær gleði av nýggju støðini, men á Lindini vóna tey, at tey í framtíðini kunnu røkka einum størri lurtaraskara.

Longu nú eru innsavningar eisini byrjaðar í Klaksvík og á Vágoynni, og hetta eru tey sera takksom fyri á Lindini. Hvussu leingi tað tekur, áðrenn støðin kann víðka um lurtaraskaran visti Preben tó ikki, tí hetta veldst alt um, nær ráð eru at keypa útgerðina, sum skal til, fyri at víðka um sendiøkið.

Sent verður soleiðis, at signal verða send frá sjálvari útvarpsstøðini, niðan til sendaran hjá Rás Tórshavn, haðani FM bylgjurnar síðani verða varpaðar út við einum 500 W sendara.

Orsakað av fjøllum v.m., er neyðugt at hava sonevnd link (sendilið) á vegnum, um so er, at varpast skal til eitt nú Klaksvíkar. Kostnaðurin fyri hvørt linkið er einar 40.000 kr. og tískil kann talan gerast um stórar íløgur, um allar Føroyar skulu røkkast.

**Alt sjálvboðið**

Merkisvert við støðini er, at alt arbeiði viðv. sendingum og øðrum er sjálvboðið arbeiði.

Eingin á støðini fær løn fyri sítt íkast, og hetta ger eisini sítt til, at tað verður lutfalsliga bíligt at reka støðina, tó at íløgurnar sjálvandi kunnu verða nakað tungar.

Í løtuni er øll skráin ikki fastløgd, men nakrar sendingar eru tó komnar í eina fasta legu, og alt í alt er talan longu nú um eini 30-40 fólk, sum eru knýtt at støðini.

Sjálvar sendingarnar verða rættuliga fjølbroyttar, og á skránni er millum annað sjómansprát, barnað- og ungdómsløta, bønartímar og mangt annað.

Sosialurin ynskir nýggju støðini at vera hjartaliga væl komna, eins og vit ynskja tykkum góðan byrð fram yvir.



*Nevndin á nýggju støðini, Preben Hansen, formaður, Símun Hansen, Jenis av Rana og Dánjal á Dul Jacobsen*

**Mynd: Jens Kr. Vang**



*Búmerkið hjá nýggju støðini*

**Mynd: Jens Kr. Vang**

# Gleðiligt

*Á móttøkuni fríggjadagin vóru nógvir ymsir gestir, og ein teirra var amerikanska Kimberly Asther*

JÁKUP MØRK

Ein teirra, sum var hjástødd, tá Lindin fyri fyrstu ferð sendi FM bylgjurnar út á 101,0, var amerikanska Kimberly Asther.

Í hálvt fjórða ár, hevur hon nú búleikast í Íslandi, har hon seinastu tíðina hevur knýtt at Íslendsku »Lindini«, og var tað í hesum sambandi, at hon nú var komin til Føroya.

Tað er jú altið soleiðis, at tað er ein góð hjálp, um fólk við royndum innan økið eru við í einum arbeiði. Kimberly hevur tí verið í Føroyum meginpartin av desember mánaði, og eftir at hon hon hevði verið heima og hildið jól, hevur nú verið við í fyrireikingunum seinastu 10 dagarnar.

Lítið er at ivast í, at royndir hennara eru komnar sera væl við hjá fyristøðufólkunum, og sjálv nevnir Kimberly telduskipanina, sum eitt av teimum økjum, har hon kundi geva sítt íkast. Talan er um somu telduskipan, sum tey nýta í Íslandi, og hevur hon sostatt greitt frá, hvussu henda riggar.

**Spennandi**

Sjálv sigur Kimberly, at hon heldur vera eitt sera áhugavert og spennandi tiltak, og ikki minst er tað gleðiligt, at støðin nu er vorðin veruleiki. Serliga tí tað í so nógv ár hevur verið arbeitt fyri hesum endamáli.



*Kimberly Asther er sera fegin um, at føroyingar nú hava fingið henda møguleika á loftmiðlaøkinum*

**Mynd: Jens Kr. Vang**

# Eisini til børn

*Í gjár, mánadagin, varð av álvara farið undir at senda eftir eini fastari skrá, og ein av tættunum í hesi er barnaløtan.*

JÁKUP MØRK

Verturin til barnaløturnar er longu funnin, og verður hetta Lív Jacobsen, sum sostatt verður at hoyra hvønn dag um hálvgum fýra tíðina, eins og sendingin verður endursend á kvøldi.

**Von at fáast við børn**

Lív er sjálvsagt spent, nú hon skal royna seg sum útvarpsvertur, men kortini sigur hon seg ikki vera bangna fyri at taka hesa uppgávu á seg.

Í fleiri ár hevur hon fingist við børnum, so fyri hana er tað sum so ikki nakað nýtt í hesum, tó at hon gleðir seg rættuliga nógv til at fara undir hesar sendingar.

Um innihaldið í sendingunum sigur hon, at har verður eitt sindur av hvørjum.

Vit fara at hoyra søgur úr barnabíbliuni, eins og barnaløg og minnisvers av ymsum slag verða at hoyra. Eisini fara vit at bijða undir hesum sendingum, soleiðis at børnini á tann hátt kunnu læra at biðja.

Lív kundi eisini avdúka, at tey í barnaløtuni væntandi fóru at fáa vitjan av eini kettu, og at talan ikki fór at verða um nakra vanliga kettu. Kettan, sum verður at hoyra í Lindini, dugir nevnliga at tosa, umframt at hon hevur ljós á halanum.

Meira vildi Lív ikki siga um hesa kettuna, men spennandi ljóðar tað í øllum førum.



Verturin í barnaløtuni eitur Lív Jacobsen

**Mynd: Jens Kr. Vang**



# Píkadekk til súkklur

*Í Súkkluhandlinum í Kollafirði ber av álvara til at skøða seg til veturin, ætlar tú tær út at súkkla á gleri og í kava. Hvørt píkadekki kostar 250 krónur.*

HØGNI MOHR

Tað melur runt hjá súkklusmiðinum í Kollafirði. Tróndur Simonsen, og konan Una, ið stendur við róðri í sjálvum handlinum í dag, lata væl at hóast árstíðina.

Tað er ein óreingiligur veruleiki, at lítið verður súkklað á vetri. Er kuldi og kavi, ja so verður als ikki farið út á tveimum hjólum. Men allur bati bøtir, og veðrið ber ikki til at broyta.

Hóast Tróndur og Una traðka sínar barnaskógvar á súkkluøkinum, nú handilin bert hevur verið opin nakrar mánaðar, ætla tey sær at broyta hendan áður so óreingiliga veruleika. Tey selja hópin av píkadekkum til súkklur.

**Fólk fregnast**

Enn ber bert til at fáa sær píkar, hevur tú vanliga vaksnamannasúkklu við 26 tumma dekkum. Dekkini eru framleidd í Finnlandi og fyri 500 krónur ber til at skøða seg bæði aftan og framman. Sambært Tróndi fær hann lítlan vinning burtur úr hesum serligu dekkum.

- Eg ætli mær bert at gera vart við, at tað er ein góður súkkluhandil í Kollafirði, sigur hann. Og sambært konuni eru tey mong, ið seta seg í samband við Súkkluhandilin í hesum døgum. Fólk ringja úr Vágunum, av Strondum og aðrastaðni við. Flestu teirra til tess at fregnast um píkadekkini.

**Heilársdekk við píkum**

Píkatíðin er millum 16. oktober og 1. mai, men Tróndur veit ikki at siga, um hon eisini er galdandi fyri súkklur.

- Men er hon tað, so er tað burturvið. Tað skulu fleiri hundrað súkklur til at slíta vegin eins nógv og eittans bilhjól, sigur Tróndur.



*Hóast Una Simonsen, súkklusmiðukona, her spælir Michelin-kona, eru píkadekkini í Kollafirði ikki fronsk, sum kendi dekk-framleiðarin. Hesi súkkludekkini eru gjørd í Finnlandi*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

Vit ringdu til Tormóð Mouritsen, varastøðleiðari á løgreglustøðini í Havn, at spyrja okkum fyri:

- *Ja, halló, er tað Tormóður?*

- Ja...

- *Góðan dag. Hetta er Sosialurin. Tú, kanst tú siga okkum, hvørji akfør, lógin um nýtslu av píkadekkum, umfatar?*

- Hvørji akfør? Øll akfør!

- *Eisini súkklur?*

- Nei, nei, nei, vælsignaður, ikki súkklur. Og heldur ikki prutl og motorsúkklur, segði Tormóður m.a.

Niðurstøðan er sostatt, at píkadekkini hjá Súkkluhandlinumí Kollafirði eisini eru heilársdekk. Og tey eru sambært Tróndi Simonsen góð í øllum hálum umhvørvi, ikki einans ísi og kava.




*Umframt hjólhestar, skøddir við summar- ella píkadekkum, selur súkkluhandilin bæði kaffi, keks og el- og gávulutir*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

ÚTSØLU
ENDABRESTUR

Komið og gerið kvettið

ØLL ÚTSØLUVØRAN NÚ FYRI
1/2 PRÍS AV ÚTSØLUPRÍSINUM

Til 1/3-2000 verður latið upp kl. 13.00

VEST MÓTI
Vestmanna • Tel. 42 44 07
&
KLÆDNABÚÐIN
Skálavík • Tel. 36 11 34

Sosialurin - 311820